

*Krambúðin í Dr. Jacobsensgøtu innan. Undir loftinum hómast skeltið við leiðarorðunum hjá Havnar Keypssamtøku frá 1952-* ***Ei at tjena frá øðrum, men hvør at tæna øðrum****. Skeltið hekk í upprunaliga í krambúðini í Bringsnagøtu*



*Finnbjørn Mouritsen kom í 1952 sum tann fyrsti í læru í keypsamtøkuni. Her koyrir hann vøru út ein vetrardag 1957*

*Framhald av síðu 9*

varð, at bygdur varð nýggjur handilsbygningur í Hoyvíkshaganum vestan fyri Hvítanesvegin. Nýggja krambúðin í Hoyvík læt upp tann 7. september 1978. Her var eisini matstova, ið frá fyrsta degi og til dagin í dag hevur verið væl umtókt og væl vitjað.

## Menningin kring landið

Árið 1961 var eitt týðandi ár í føroysku samtøkusøguni, tí hetta ár vórðu stovnaðar keypsamtøkur í Klaksvík og í Fuglafirði. Í báðum støðum høvdu stovnararnir at kalla somu trupulleikar sum stigtakarunum í Havn høvdu verið fyri: mótstøða frá stórkeypmonnum á staðnum. Nýggj krambúð læt upp í Fuglafirði 13. juli 1978. Hetta var ein sannur hátíðardagur í bygdini, og fólk tóku væl ímóti tí nýggja handlinum. Hetta sást eisini av, at sølan vaks munandi, eftir at nýggja krambúðin var latin upp.

Tann 1. apríl 1965 vórðu tær tríggjar føroysku keypsamtøkurnar skipaðar í ein felagsskap, við tað at *Føroya Keypssamtøka* varð stovnað. Samtøkurnar í Havn, Klaksvík og í Fuglafirði gjørdust nú deildir í Føroya Keypssamtøku, og limirnir høvdu eftir hetta beinleiðis limaskap í Føroya Keypssamtøku. Endamálið við Føroya Keypssamtøku var hitt sama sum í fyrstu samtøkuni, nevnilig *at útvega limunum í felag og undir so góðum treytum sum gjørligt góðar og óspiltar vørur.*

Føroya Keypssamtøka var skipað við aðalfundi, felagsstjórn og einari limanevnd fyri hvørja deild í ávikavist Tórshavn, Fuglafirði og í Klaksvík.

Suðuroyar Keypssamtøka hevði stovnandi aðalfund 10. august 1976, og tann 5. desember 1984 læt fyrsta krambúðin upp í leigaðum hølum. Tann 25. oktober 1990 flutti Suðuroyar Keypsamtøka í nýggjan og stásiligan handilsbygning Úti í Trøð í Trongisvági.

Vága Keypssamtøka hevði stovnandi aðalfund 23. apríl 1976 og læt tann 21. juni 1979 ein nýggjan og framúr góðan handilsbygning í Miðvági upp. Tann 30. november 1989 læt keypsamtøka upp í Saltangará, og sostatt fevndi samtøkurørslan við einum stórum og trúføstum limaskara mestsum um alt landið um aldamótið.

## Ein rørsla í menning á tryggum støði

Ein keypsamtøka er ikki bert ein krambúð við fjølbroyttum og dygdargóðum vørum til sámiligar prísir. Keypsamtøkan er fyrst og fremst ein *hugsjón* og ein rørsla á breiðum og tryggum hugmyndaligum støði. Tað kom ikki av ongum, tá ið stovnararnir í 1952 sum leiðarorð ella motto settu hesi orð: *Ei at tjena frá øðrum, men hvør at tæna øðrum.* Hóast føroyski málburðurin kanska ikki er tann, ein vildi nýtt í dag, lýsa hesi leiðarorð á framúrskarandi hátt kjarnuna í altjóða samtøkuhugsjónini.

Tað, sum myndar støðið, eru hugtøk sum felagsskapur og almannagagn fram um egið gagn, samhaldsfesti, ábyrgd fyri viðskiftafólki og ábyrgd fyri umhvørvi, ella snøgt sagt ein keypsamtøka er ein fyritøka, sum bert er til fyri brúkaran. Ein keypsamtøka setur sær bert brúkarans gagn og frama sum mál. Endamálið er ikki í sjálvum sær at vinna pening til fyritøkuna og hennara ánarar. Her skal eingin einskildur partaeigari ella áhugabólkur vinna pening av umsetninginum. Endamálið við vinninginum hjá samtøkuni er at gera samtøkuna so sterka og vælkonsolideraða, at hon áhaldandi kann tæna brúkaranum uppaftur betur — at eitt nú Føroya Keypssamtøka í alt vaksandi mun megnar at tæna endamálinum við leiðarorðunum hjá teimum hugdjørvu undangongufólkunum, sum stovnaðu fyritøkuna tann 3. apríl 1952.

Limirnir eiga fyritøkuna, og hennara fremsta mál er at tæna og gagna limum og teimum fólkum, sum velja at keypa í eini keypsamtøku. Hetta at fara í eina keypsamtøku til handils er eitt val. Hetta er ein hugburður — ein sunnur og dámligur hugburður. Tá ið tú fert til handils í eini keypsamtøku, veitst tú, at vinningurin kemur allari heildini til góðar. Ikki so at skilja, at limir nú eins og tey fyrstu mongu árini fáa lut í avlopinum í mun til keyp. Heldur er tað hetta, at ein fyritøka, ið ikki setur sær egið gagn sum mál, í sjálvum sær hevur eitt gagnligt árin á alt handilsumhvørvið. Henda skipan gevur eina ektaða og heilhugaða kapping millum allar handilsfyritøkur á staðnum til mikið gagn fyri brúkararnar. Av hesi orsøk gagnar keypsamtøkan eisini teimum brúkarum, ið bert keypa frá privatu handilsfyritøkunum. Hetta er áhugavert, og man hetta vera ein orsøkin til, at øll í grundini eru góð við keypsamtøkuna — eisini tey, sum ongantíð handla har.

Men samtøkuhugsjónin er annað og meira enn dygdarvørur og sámiligir prísir. Hugsjónin ber við fólkaræði, tí allar keypsamtøkur verða stýrdar eftir demokratiskum meginreglum. Hugsjónin fevnir um umhvørvisfyrilit og brúkaraáhugamál, trygd og trivnað og felags gagn fram um egið gagn at fremja.

Tann týdningur, samtøkuhugsjónin í Føroyum eins væl og kring allan heim hevur havt og framvegis hevur fyri brúkaran, kann ikki yvirmetast. Týdningurin er ikki bert hugsjónaligur. Hann er eisini at finna í tí meira jarðbundna — í hesum, sum tey gomlu havnarfólkini søgdu um keypsamtøkuna í Bringsnagøtu: *Hon er tann besti prísansarin í Havn.* Hesi orð, sum mangan vóru at hoyra undir útgerðarhandlinum hjá Jákupi á Lað, undir neystunum á Bursatanga og í Undirhúsinum, eru enn tann dag í dag so sonn, sum tey eru søgd.



*Í fimti og sekstiárunum var Hjalmar Olsen ættaður ú Tjørnuvík leiðari í krambúðini í Dr. Jacobsensgøtu. Her sæst hann inni í krambúðini í práti við Jógvan Poulsen, ið var limur í fyrireikingarnevndini 1951*





*Stjórn og fyristøðumaður 2002, f.v.: Finn Nielsen, fyristøðumaður, Petur J. Eliasaen, næstformaður, Fuglafjørður, Inna Nattestad. Miðvágur, Sørin Danielsen, Kunoy, Sigrid Dalsgaard, formaður, Hoyvík, Gunnvør Eriksen, Tórshavn, Karin Kastalag, Glyvrar, Karin Johansen, Hov og Gullberg Gullfoss, Hoyvík*



*Deildaraleiðarar 2002, f.v.: Jan Gardar, Klaksvík, Bo. M. Hansen, Dr. Jakobsensgøta, Gert Levisen, Trongisvágur, Bent Lundsgaard, Hoyvík, Álvur Samuelsen, Miðvágur, Emil Ludvig, Fuglafjørður og Ingunn Davidsen, Saltangará*

Alt hetta hava havnarfólk skilt, tá keypsamtøkan kom. Undirtøkan hesi fimmti árini hevur verið stór og sterk. Uttan mun til politiskan lit ella átrúnaðarliga lívsáskoðan stóðu limirnir øksl móti øksl, tá ið politiskir ella búskaparligir brotasjógvar brutu. Havnarfólk gjørdust góð við hesa sermerktu fyritøku, tey gjørdust góð við henda handil, sum gekk sínar egnu leiðir, og tey eru framvegis góð við hann.

Sama er um limir og viðskiftafólk kring alt landið at siga. Fólk í Suðuroy, í Vágum, í Norðoyggjum og í Eysturoy eru góð við lokalu keypsamtøkurnar og standa saman um tær.

Fólk vita og kenna, at hetta eru teirra handlar. Uttan mun til limaskap ella ei kenna tey á sær, at tey eiga keypsamtøkuhandlarnar, og tí kenna tey eina felags samábyrgd av teimum.

Henda samábyrgd er ikki sum í gomlum døgum í Toadlane ella í Bringsnagøtu ein búskaparlig samábyrgd, har limirnir í felag heftu fíggjarliga fyri fyritøkuna. Her er talan um eina samábyrgd av einum øðrum og hægri slagi — ein samábyrgd fyri eini felags hugsjón, ið røkkur nógv longri. Hon skal fram um alt tryggja, at rørsluni er lív lagað. Bert við at liva og yvirliva kann upprunaliga málið uppihaldast í eini verð, sum støðugt broytist við ómetaligari ferð. Og upprunaliga málið er enn sum áður at útvega fólki dygdarvørur til sámiligar prísir ella umskrivað til leiðarorðini yvir skivuni í Bringsagøtu: *Ei at tjena frá øðrum, men hvør at tæna øðrum.*

## Framtíðin

Samanumtikið ber til at staðfesta, at keypsamtøkurørslan í Føroyum hevur nátt teimum málum, sum stovnararnir settu sær í 1952. Sølan hevur uttan eitt ár verið javnt vaksandi, soleiðis at Føroya Keypssamstøka nú er millum størstu handilsfyritøkur í landinum.

Tað má eisini ásannast, at keypsamtøkan hevur havt stóran týdning fyri prísleguna í landinum, og man eingin í dag ivast í, at prísirnir á brúkaravørum høvdu verið hægri, um keypsamtøkur ikki vóru kring landið. Hesin týdningur eigur ikki at undirmetast, tá ið mett skal vera um týdningin á hesi rørslu.

Spurningurin, hvussu framtíðin kemur at laga seg, er ongantíð lættur at svara. Tó er einki at ivast í, at keypsamtøkan kemur at liva og blóma til gangs fyri limir og samfelag.




*í 1971 vórðu bygd nýggj handilshús í Dr. Jacobsensgøtu*




*Tann 7. november 1978 læt nýggja krambúðin í Hoyvík upp*